EG MEINI TAÐ

Føroyingar

Sonne Smith

Viðhvørt er tað heilt merkiligt at hugsa sær, at eg sum skrivi hetta, eri føroyingur, enntá einnevndur føroyingur í Føroyum, ja, enntá einnevndur í allari verðini.

Tað eru so nógvir einnevndir føroyingar í verðini av tí, at teir eru einnevndir í Føroyum og búgva uttanlands. Tak til dømis Simon von Konoy, alias Símun úr Konoy. Hann býr uttanlands, ella skuldu vit heldur sagt, í Suðurdanmark. Eg veddi upp á, at eingin annar eitur hvørki Simon von Konoy ella Símun úr Konoy. Hann er gøtumaður. Hvussu nógvir gøtumenn eru til? Tað er sjálvandi ilt at siga, tí í allari verðini eru kanska fleiri túsund gøtumenn, men í Gøtu ein dag, ella í fleiri dagar, búgva fleiri hundrað gøtumenn. Eitt nú Jógvan Salamon Joensen. Taka vit og skilja Føroyar frá verðini, so er Jógvan Salamon Joensen helst einnevndur. Men sjálvur ivast hann í, um ikki onkur annar eitur Jógvan Salamon Joensen. Hann heldur, at ein leirvíkingur, sum býr í Leirvík, eitur soleiðis eisini. Og nú fór eg at ivast, um eg havi stavað navnið rætt. Mær var hyggjandi í telefonbókina, og Gud hjálpi tú mær eitur hann Jógvan Salomon.

Sorry Sofus!

At hugsa sær, at tað skulu vera so fáir sumbingar í verðini. Bara nakrir hundrað. Tað má vera fantastiskt at vera sumbingur. Tað má vera nógv meiri fantastiskt enn at vera frumskógarindianari í Amazonas, tí teir eru nógvar ferðir fleiri í tali. Tað má vera stuttligt, ella ið hvussu er heilt burturav sjáldsamt at vera sumbingur.

So er tað Trongisvágur – fyrr Trangisvaag – bygdin heilt har inni í Froðbiar sókn. Hugsa sær tíl, at ein trongisvágsingur hevur verið maskinmeistari – chiefur – í Disney World í Kalifornia, ha? Men hann var ikki einnevndur, tí hann æt Lindberg, minnist meg rætt. Hann æt Lindberg, tá ið hann fór úr Trongisvági til Amerika at búgva.

Onkur føroyingur býr í Tokyo og lærir seg at eta fisk. Ein annar býr onkustaðni í Teimum Sameindu Emirríkjunum og virkar sum oljuvinnuserfrøðingur. Hann er føroyingur, men tað hugsa hasir arabararnir ikki um. Teir eru karvandi líka glaðir. Hann skal bara hjálpa teimum við at fáa nakað burtur úr oljuni. Hann kann ikki fara og meina nógvar pengar afturfyri. So nógvar pengar, at vit hava yvirhøvur ikki ráð at senda boð eftir honum.

Mann kann ikki fara og betala fyri sovorðið tvætl. Nei nei, latið okkum fáa útlendingar. Ein føroyingur er ikki førur fyri at útinna nakað oljuavrik ella oljubragd í Føroyum. Tað duga vit ikki, um maðurin so glíður í olju har suðuri í Persaflógvanum hvønn tann einasta dag.

So eru tað uppaftur fleiri hálvir føroyingar enn heilir føroyingar. Tað eru eisini nokkso nógvir fjórðingsføroyingar til, hvussu mann so ber seg at við tí. Men tað skerst ikki burtur, at tað er nógv fínari og virðiligari at vera hálvur ella fjórðingsføroyingur, um so er, at viðkomandi hevur skorað eitt mál onkustaðni í Suðureuropa, fyri ikki at siga Suðuramerika. Tað mugu vit skriva síðu upp og síðu niður um. Vit eiga eisini eitt føroyskt fótbóltslið í Danmark. Todi Jonsson eigur tað, tí tað stendur altíð at lesa á ítróttarsíðunum, at FCK er liðið hjá Toda. Og Todi er hálvur klaksvíkingur og hálvur søldfirðingur. Tað er ikki so sjáldsamt at vera klaksvíkingur, tí teir eru fleiri túsund í tali.

Jamen, er tað ikki herligt at vera føroyingur? Vit klóra eyguni úr hvørjum øðrum, tí at vit øll hvør í sínum lagi halda tey flestu vera kraftidiotar, tí vit hava ikki somu meining um alt.

Vit føroyingar skulu liva við, at vit hava dømt okkum sjálvar í somu løtu, vit koma í verðina.

Vikuskifti

Postboks 19, 110 Tórsahvn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

Garborg 150

BÓKMENTIR
Birgir Kruse

Hósdagin vóru 150 ár liðin síðani norski rithøvundurin Arne Garborg varð føddur. Hesin sermerkti norski høvundur legði í fyrstu skaldsøgunum eftir kirkju og morali yvirhøvur. Eisini heitið á fyrstu skaldsøguni »Ein fritenkjar« endurspeglar hetta. Skaldsøgan kom í 1878. Síðani komu »Bondestudentar« (1883) og »Mannfolk« (1886).

Eftir at verða mettur sum ein av teim »radikalu« í norskum andslívi, letur Garborg høvuðspersónin í skaldsøguni »Trætte mænd« púra óvæntað í kristnan ham.

Framhaldandi skaldskapur hansara ber nú brá av einari átrúnaðarligari idealismu, sum sprettir í fullum blóma í frásøgukvæðnum »Haugtussa« (1895). Bókmentafólk hava stundum víst á Leo Tolstoj sum íblástur hetta skeiðið. Partar úr »Haugtussa« eru endurgivnir í savninum »Nýbrotið í norðurlendskum bókmentum«, sum forlagið Sprotin gav út í 1994. Gunnar Hoydal hevur týtt tekstin til føroyskt.

Sama frásøgukvæði er givið út á fløgu við norsku sangarinnuni Lynni Treekrem og tónleiki eftir Ketil Bjørnstad í 1995. Útgevari er Kirkelig Kulturverksted, sum forlagið Ascehough eigur.



Eilif Petersen málaði Arne Garborg í 1894 (Nasjonalgalleriet)

Arne Garborg, sum var íðin talsmaður fyri nýnorska landsmálinum, er á ein hátt grundarsteinurin undir hesum stóra norska bókaforlagnum, Aschehoug. Fyrsta skaldsøga, hetta forlag gav út, var júst hansara »Trætte mænd« í 1891.

Í sambandi við 150 ára dagin gevur sama forlag út øll bókmentaverk Garborgs, tilsamans 12 bind. Harumframt verða dagbókabløð givin út í bók undir heitinum »Dagbøker fra Labråten«.

Tað var á 54 ára føðingardegnum, at Arne Garborg setti sær fyri at skriva dagbók restina av lívinum. Hetta var í 1905. Garborg andaðist hin 14. januar 1924.

Verdi doyr í Milano

TÓNLEIKUR
Birgir Kruse

Í dag eru hundrað ár síðani italska tónaskaldið Guiseppe Verdi doyði í Milano. Verdi, sum gjørdist 87 ára gamal, varð serliga kendur innan opera. Hann var útbúgvin á sama staði, Milano, har fyrsta opera hansara »Oberto« varð framførd í 1839.

Fosturlandski tónin í verkunum hjá Verdi elvdi til, at hann skjótt gjørdist símbol fyri teimum, ið vildu savna tjóðina.

Sagt verður um Verdi, at við framúr evnum at siga søgur og skapa drama, samantvunnin við einum mettaðaum orkesturklangi, skapti hann italsku operuni nýggjar karmar. Eitt heiðursgláss, sum hann lutar við Giacomo Puccini (1858-1924).

Í 1982 gjørdi Franco Zefirelli film úr operuni »La Traviata«. Filmurin, har Placido Domingo medvirkaði, varð sýndur í Norðurlandahúsinum í 1985. Í august verður aftur høvi hjá føroyingum at uppliva hesa operu í Norðurlandahúsinum. Tá fer Stockholms Folkteater at framføra »La Traviata« í modernaðum sniði.

Nýliga kom út forvitnisliga bókin »Guiseppe Verdi – myten, mennesket og komponisten« í forlagnum Gyldendal. Rithøvundur er Francesco Cristofoli.

Verdi varð føddur 10. oktober 1813 og doyði 27. januar 1901. Í grein inni í blaðnum greiðir Ove Olsen, tónleikaleiðari í Útvarpinum, frá um Verdi.

Trier í Trollhättan

FILMUR
Birgir Kruse

Kendi, nýskapandi danski filmsleikstjórin Lars von Trier (f.1956) er nú undir nýggjan film. Fyrsta, sum grett er, er heitið á filminum. Tað verður »Dogville«. Nýggi filmurin verður tikin í Trollhättan í Svøríki, har sum »Dancer in the Dark« fyri mesta partin eisini varð tikin. Tá vóru eisini upptøkuhølini hjá Zentropa í Avedøre nýtt, hóast leikur at síggja til fer fram á bygd í Amerika.

Sagt verður, at nýggi filmurin líkist, ella í minsta lagi hellir seg afturat hesum fyrra filmi Triers. Íslendska Björk spældi høvuðsleiklutin í honum og skrivaði seg samstundis inn í eina røð av kvinnum í truplum leiklutum, sum Trier meistaraliga hevur greitt til film. »Breaking the Waves«, »Idioterne« og »Dancer in the Dark«.

Í himmalskari vreiði afturvið tónum Verdi's – Stellan Skarsgård í »Den enfaldige mördaren« 1982

Í djúpt átrúnaðarliga filminum »Breaking the Waves«, sum í støðum fær ein at hugsa um russiska meistaran Andrej Tarkovskij (1932-86), medvirkar svenski leikarin Stellan Skarsgård (f. 1951). Í svenskum bløðum hevur Stellan sagt, at fær hann arbeiðsboð frá Trier, so er hann til dystin fúsur beinanvegin.

Skarsgård hevði høvuðsleiklutin í svenska filminum hjá Hans Alfredson »Den enfaldige mördaren« í 1982. Í avgerandi senuni, tá góðlynti mordarin fer til verka og ger enda á harðrenda arbeiðsgevaranum, er tað afturvið dunandi tónum Guiseppe Verdi's. Ein av stórbærastu norrønu upplivingunum á løriftinum.

Filmsliðið hjá Trier fer undir »Dogville« í mai og upptøkurnar skulu verða lidnar innan 1. juli, tá amerikanskir filmsleikarar helst fara í verkfall. Um Trier fer at tríva eins djúpt í pengakassan, sum tá hann gjørdi »Dancer in the Drak« er ikki víst. Tann filmurin kostaði 100 milliónir krónur.

FRÁ LISA TIL SVF. Malan Johannesen gevst at skriva fyri Listafólkasambandið og fer aftur í Sjónvarpið

Malan aftur í sjónvarpið

STARVSKIFTI
Birgir Kruse

Malan Johannesen, sum vit kenna frá mentanarsendingum í Sjónvarpinum, hevur eitt skifti verið skrivari hjá LISA, tað er Listafólkasamband Føroya. Men nú gevst Malan sum skrivari og fer aftur í gamla mentunarstarvið í Sjónvarpinum.

Um orsøkina til hetta skiftið frá skrivandi mentan til myndandi mentan, sigur Malan, at tá hon søkti starvið í LISA, var tað fyri at taka av einari avbjóðing, sum hon helt vera spennandi.

Ikki tí, tað var hon eisini, sigur Malan, men eg havi ikki so góða heilsu og tað noyðist eg at laga meg eftir. Avbjóðingin varð í størra lagi, leggur hon afturat.

Arbeiði í LISA hevur gingið væl, heldur Malan. Hetta er eitt nýtt starv og tað var spennandi at sleppa at leggja lunnar undir nakað, sum ikki hevur verið fyrr.

Mær dámar væl at samstarva við onnur og tað er tað, sum arbeiðið í LISA í stóran mun snýr seg um, undirstrikar Malan. Eisini hevur tað verið stuttligt at hjálpt til at leggja heimasíðuna hjá LISA til rættis. Hon kemur á netið hvørja løtu, lovar fráfarandi skrivarin.

– Hvussu kanst tú í stuttum lýsa LISA?

LISA er meginfelagið hjá øllum listafólkafeløgunum í landinum og hyggja vit í lógirnar, so kann endamálið lýsast við hesum setningum: at kveikja og stimbra føroyska list og mentan, at fremja samstarv millum føroysk listafólk og millum tær einstøku listagreinarnar, at virka fyri áhugamálum og rættindum limanna og at umboða limirnar alment í almennum málum, sum hava felags áhuga.

Eitt av aðalmálunum hjá LISA er at arbeiða fyri at fáa til vega karmar, sum føroysk listafólk kunnu trívast og virka í.

Í hesum sambandi nevnir Malan, at mentanarnevndin hjá Løgtinginum hevur vent sær til LISA eftir viðmerkingum til uppskotið til lógina fyri Mentanargrunn Landsins, sum var samtykt í fjør.

Mynd: Jens Kr. Vang

LISA hevur eisini skyldu til at innstilla limir til ymiskar nevndir, sigur Malan. Millum aðrar hana, sum letur nógv umrøddu Mentanarvirðislón Landsins, og so skal felagsskapurin eisini innstilla tveir limir í nevndina fyri Mentanargrunn Landsins.

Vit hava eitt tætt samstarv við Mentamálastýrið, sigur fráfarandi skrivarin. Tað kann vera um mál, sum viðvíkja listafólkum, umframt at tað javnan verður heitt á okkum um upplýsingar um alt møguligt, sum hevur við list og mentan at gera, sigur Malan.

Vit hava eisini samstarv við listafólkafelagsskapir í hinum Norðurlondunum og úti í heimi. Skrivstovan hjá LISA skal harafturat vera ein upplýsingarmiðstøð fyri limafeløgini og øll onnur við, sigur Malan, sum leggur afturat, at øll eru vælkomin at venda sær til LISA. – Vit hava møguleikar fyri at fáa til vega tilfar um mangt og hvat, sum meiri enn so kann vera forvitnisligt og hent!

Hvat ert tú fegnast um av tí, tú higartil hevur arbeitt við?

Tað sum mær dámar best at arbeiða við er at formidla – hetta at seta ljós á fólk, sum hava nakað uppá hjartað, sigur Malan og leitar aftur til tíðina við mentanarsendingum í Sjónvarpinum, sum onkrar nýliga hava verið endursendar.

– Tað lá væl fyri, tá ið eg arbeiddi við mentanarsendingum í SVF, tað var ein natúrligur partur av starvinum og ótrúliga spennandi arbeiði at gera, sigur Malan, sum eisini hevur verið lærari. – Mær hevur dámað væl at undirvísa. Tað er eisini eitt slag av formidling, haldi eg.

– Eg havi verið ógvuliga fegin um eisini at vera LISA-umboð í Mentanargrunni Føroya Løgtings í fleiri ár. Tað er hugaligt at síggja, at nógv sum hava fingið stuðul úr grunninum til sítt fyrsta avrik, so við og við hava ment seg til fín listafólk, sigur Malan.

– Tá ið tú fært við sovorðið sum eg havi gjørt eisini her í LISA, so fært tú so við og við fatan av, hvussu týdningarmikið tað er fyri eitt listafólk at sleppa at skapa. Tað kann summatíðir vera ringt at skilja fyri okkum gerandisfólk, men eg má siga at eg havi fingið stóra virðing fyri hesum fólkum. Vóru tey ikki so áhaldandi í síni skapanartrongd og virkisgleði, so varð deydligt og tómt á hesum klettum, heldur Malan fyri nú hon leggur frá sær í Skansastovu, har felagsskapurin LISA heldur til á ovastu hædd.

Hiðani ynskja vit Maluni góða eydnu!

SJÓNLEIKUR. Í Fuglafirði er tiltakandi áhugi fyri sjónleiki. Í næstu viku fara tveir ungir fuglfirðingar ta longu leið til Litava á sjónleikaraskeið

Brøður til Litava

Á SKEIÐ
Birgir Kruse

Herfyri sendi Meginfelag áhugaleikara Føroya eitt skriv til sjónleikarafeløgini, har boðað varð frá skeiði í einum av Baltalondunum. Sum limir í Fuglafjarðar Sjónleikarafelag tóku tit av og tað var alt leyst og liðugt hesar vegin, siga teir báðir 25 ára gamli Mortan og 26 ára gamli Árant G. Berjastein.

Teir eru brøður, sum báðir hava áhuga fyri sjónleiki. Serliga nú nýggja Mentunarhúsið skal lata upp í Fuglafirði.

Sjónleikaraskeið

Klaipeda eitur býurin, sum er í Litava, einum av teim trimum Baltalondunum. Tað er har forkunnuga skeiðið er. Tað varir eina viku og er fyri áhugaleikarar innan leik og stjórnan. Mortan hevur valt leikin, meðan Árant hevur valt hitt seinna, at stjórna. Tað er fyrstu ferð, at føroyingar eru við. Oftast eru luttakararnir úr Norðurlondum og Eysturevropa, siga ferðabúnu sjónleikarabrøðurnir úr Fuglafirði. Árant, sum dagliga arbeiðir á føðurdeildini hjá Havsbrún, og Mortan, sum gongur á HD í Klaksvík, eru spentir fyri ferðina. Vit vænta at fáa nógv burturúr, sum kann koma okkum til góða, tá vit eru heima aftur. Hóast ferðin bert fevnir um nýggju dagar, er skráin drúgv og fjølbroytt. Tað verður helst strævið, tí alt er á enskum. Men vit eru spentir, at hitta onnur fólk úr øðrum tjóðum.

Skemtileikur

Heima í Fuglafirði eru teir báðir Mortan og Árant saman við øðrum farnir undir at venja ein skemtileik. »Fiskar á turrum landi« er heitið á leikinum, sum Turið Sigurðardóttir hevur týtt eftir Árna Ibsen. Fýra leikarar eru við, teirra millum Mortan. Og so eru eini 6-10 medhjálparar. Tað er ilt at siga beint nú, halda teir. Sjónleikur hevur tað at vinda uppá seg. Og so er hetta eisini sveinastykkið hjá Áranti, heldur bróðurin ertandi fyri. Tí tað er hann, sum skal stjórna leikinum, saman við Magna Joensen úr Gøtu, sigur Mortan.

Mentanarhús

Fyrsta sýning av »Fiski á turrum landi« hjá Fuglafjarðar Sjónleikarafelag er sett at verða tá nýggja, stásiliga bygdahúsið, Fuglafjarðar Mentanarhús, verður tikið í brúk. Tað verður á Varmakeldustevnu, sum verður um mánaðarskiftið juni-juli. Vónirnar eru stórar til húsið, sum Niels Midjord hevur teknað. Og ljóðvíðurskiftini skuldu verið góð, siga Mortan og Árant. Sami maður, sum roknað ljóðiðút í Sydney, tá Operahúsið hjá Utzon varð bygt, hevur verið uppí ætlanini hjá fuglfirðingum. Soleiðis bara av áhuga.

Sjónleikabrøðurnir Mortan G. og Árant G. Berjastein við nýggja Mentanarhúsið í Fuglafirði Mynd: Jens Kr. Vang

Ætlanin er at spæla minst ein leik hvørt árið. Tað er tað allar minsta, sigur Mortan. Tá man hevur fingið hølið, so er at brúka tað. Men tað mangla nýggjar kreftir til sjónleik í Eysturoynni, heldur hann.

Í nýggja mentanarhúsinum verður konserthøll við plássi til 200 fólk. Verða báðir salarnir brúktir, so kann borðreiðast til 300 fólk. Men tá er eingin pallur. Húsini hava staðið í gerð í nógv ár. Byrjað var fyri eini sjey árum síðani og so hevur tað gingið spakuliga framá, uttan ta stóru lántøkuna, siga sjónleikabrøðurnir í Fuglafirði.

So sjónleikarafelagið eigur at kalla øll húsini, nú tey eru um at verða liðug. Kommunan hevur stuðlað heilt fitt við 1, 5 millión. Nógvir aðrir stuðlar eru eisini. Uttan teir bar einki til, halda Mortan og Árant.

Nýggja mentanarhúsið er mitt í býnum, omanfyri bátahylin og niðanfyri hjá Haraldsen, tey rópa. Beint við síðuna av gamla sjónleikarhúsinum, sum nú er forrætning. Í gamla sjónleikarhúsinum var helst bara dansur, halda teir seg minnast. Vit eru ov ungir at minnast Silly Boys og Absurdy Fair. Kanska er okkurt kjallaraorkestur, men tað man verða smáligt, heldur Mortan.

Tvey ár á rað hevur Varmakelduteitið verið framført í Fuglafirði. Tað vóru Mortan og Marita Øre, sum tóku stig til tað. Áhugin millum fólk er stórur, men higartil hava hølini manglað. Nú verður betri, siga teir báðir, sum gleða seg til ferðina, sjónleikin og mentanarhúsið.